## Venja at skjóta flogfør niður

Flogskiparar á amerikonskum jagaraflogførum fáa miðvísa venjing í at skjóta ferðamannaflogfør niður, sigur ein av ovastu leiðarunum í flogvápninum.

Ralph Eberhart, generalur, sigur, at flogskipararnir venja fleiri ferðir um vikuna. Endamálið er sambært generalinum at venja flogskipararnar við, at teir einaferð kunnu koma í ta støðu, at teir noyðast at skjóta eitt ferðamannaflogfar við fleiri hundrað ósekum ferðafólkum niður. Hjá teimum flestu flogskiparunum er hetta púra óhugsandi, men vandin fyri, at yvirgangsmenn fara at ræna flogfør og at nýta tey eins og 11. september í 2001, ger, at flogskipararnir noyðast at venja seg við tankan, sigur Ralph Eberhart.

Generalurin sigur, at flogskipararnir eru fyrireikaðir nú, men eins og flogskipararnir vónar hann, at teir ongantíð fáa brúk fyri tí, teir hava vant.

## Tit finna einki

Iranski forsetin, Mohammad Khatami, endurtekur nú, at land hansara hevur einki at fjala fyri eftirlitsmonnunum hjá altjóða kjarnorkustovninum IAEA. Sama hvussu teir kanna og leita, finna teir einki, sigur forsetin.

IAEA hevur givið iransku myndugleikunum freist til tann 31. oktober at lata stovninum allar upplýsingar um landsins kjarnorkuætlanir. Higartil hevur Iran sett seg upp ímóti kravinum, og júst í hesum døgum eru samráðingar millum Iran og IAEA um kravið. So seint sum í gjár hevði Khatami sjálvur fund við umboð fyri kjarnorkustovnin.

Samstundis komu tíggju eftirlitsmenn hjá stovninum til Iran. Teir næstu fjúrtan dagarnar skulu teir ferðast aftur og fram í landinum í einari roynd at skráseta allar smálutir í iransku kjarnorkuverkætlanini. Amerikanarar leggja Iran undir at hava ætlanir um at gera kjarnorkuvápn, men tað avsanna iranar. Teir siga, at kjarnorkan skal einans nýtast til friðarlig endamál.

## Fingramerki í passið

Løgmálaráðharrarnir í ES-londunum hava nú samtykt, at umframt mynd skulu fingramerki setast í visum og uppihaldsloyvi.

Endamálið við samtyktini er at gera tað truplari at falsa slík skjøl og at steðga ólógligum innflytarum, men samtyktin er eisini liður í stríðnum ímóti yvirgangi. Løgfrøðiligi ES-kommiserurin, Antonino Vitorino, sigur, at allir ráðharrarnir tóku undir við uppskotinum.

Borgararnir í ES-londunum skulu eisini hava okkurt frámerki í síni pass afturat myndini, og talan kann vera um fingramerki. Amerikonsku myndugleikarnir hava kravt, at í framtíðini skulu evropearnir hava eitt frámerki afturat myndini, ætla teir sær til USA uttan visum. ES-løgmálaráðharrarnir siga kortini, at tann nýggja samtyktin kemst ikki av amerikanska kravinum, og at USA hevur heldur ikki lagt trýst á ES í hesum máli.

## Misnøgd við kríggið

Ein nýggj meiningakanning vísir, at meiri enn helmingurin av amerikanska fólkinum heldur, at tað var skeivt av USA at leypa á Irak.

Kanningin, sum sjónvarpið CNN og The New York Times hava gjørt, vísir, at 53 prosent av teimum spurdu halda, at tað var skeivt at leypa á Irak. 44 prosent siga, at tey eru nøgd við uttanríkispolitikkin hjá Bush, forseta, men 50 prosent halda ikki, at forsetin hevur verið heppin í uttanríkispolitikkinum.

CNN og The New York Times spurdu eisini, hvønn fólk fara at velja á næsta forsetavalinum. 44 prosent svaraðu, at tey ætla sær at velja Bush, og onnur 44 prosent svaraðu, at tey ætla sær at velja tað demokratiska valevnið, sum fer at stilla upp ímóti forsetanum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Eingi hópoyðingarvápn at finna í Irak



*Irak hevði eingi hópoyðingarvápn, sum kundu hótta USA, sigur leiðarin hjá amerikonsku, bretsku og avstralsku vápnaeftirlitsmonnunum, David Kay*

**Vápnaeftirlitsmenn úr USA, Bretlandi og Avstralia hava heldur ikki funnið nøkur hópoyðingarvápn í Irak. Men teir siga seg hava funnið prógv fyri, at landið ætlaði at gera slík vápn**

VÁPNALEIT
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

-Vit hava ikki funnið nakrar vápnagoymslur, men vit kunnu framvegis ikki siga við vissu, um irakar høvdu slíkar vápnagoymslur fyri kríggið. Tað einasta, sum vit nú hava eftir at gera, er at kanna, hvat so er vorðið av vápnunum, sigur amerikanarin David Kay, sum er leiðari hjá teimum amerikonsku, bretsku og avstralsku vápnaeftirlitsmonnunum, sum seinastu mánaðarnar hava leitað eftir hópoyðingarvápnum í Irak.

David Kay segði á tíðindafundi í gjár, at hann og hansara menn hava heldur ikki funnið nakað prógv fyri, at Irak var til eiðar at nýta evnafrøðilig ella lívfrøðilig vápn ímóti hermonnunum, sum lupu á Irak. Var tað so, eru eingi prógv fyri tí í dag, segði hann.

### Fjaldu ymiskt

Sambært leiðaranum hjá eftirlitsmonnunum hevur Irak eisini havt ætlanir um at útvega sær kjarnorkuvápn, men David Kay sigur, at enn hava eftirlitsmenninir ikki funnið nakað, sum prógvar, at irakska stýrið gjørdi nakra roynd á hesum øki aftan á 1998.

Bæði David Kay og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, løgdu á tíðindafundinum dent á, at eftirlitsmenninir eru ikki lidnir við sínar kanningar, tí fleiri støð eru ikki kannað enn. David Kay nevndi í hesum sambandi, at tað ber til at fjala hópoyðingarvápn í einum vanligum bilhúsi, so tað sigur seg sjálvt, at tað er lætt at fjala slík vápn, segði hann.

Sambært David Kay eru amerikonsku, bretsku og avstralsku eftirlitsmenninir komnir fram á umleið tíggju ídnaðarvirkir, sum kunnu setast í samband við hópoyðingarvápn, og hann sigur eisini, at eftirlitsmenninir hava funnið nógva útgerð, sum irakar fjaldu fyri ST-vápnaeftirlitsmonnunum, tá teir leitaðu í Irak seinasta vetur. Teir hava eisini funnið nakrar rannsóknarstovur og nakrar loyniligar bygningar, sum irakska fregnartænastan hevði, og sum kunnu setast í samband við hópoyðingarvápn. Millum annað hava eftirlitsmenninir funnið eina rannsóknarstovu inni í einum fongsli, og sambært David Kay er tað ikki óhugsandi, at irakar hava gjørt evnafrøðiligar royndir við fangum har.

### Ikki samsvar

Amerikonsku, bretsku og avstralsku eftirlitsmenninir siga seg hava prógv fyri, at irakar beindu fyri telduútgerð og forritum, sum kunnu hava havt samband við hópoyðingarvápn. Sambært David Kay bendir nógv á, at Irak varðveitti fleiri smáar verkætlanir og ymsa útgerð aftan á 1991, sum kundu gera landið ført fyri at gera hópoyðingarvápn eftir stuttari tíð.

Men tað eru eingi prógv fyri, at landið nakrantíð setti hesar ætlanir í verk, og sambært David Kay bendir nógv á, at landsins møguleikar at gera hópoyðingarvápn vóru nógv skerdir og kanska als ikki vóru til staðar.

Hóast frágreiðingin hjá eftirlitsmonnunum er ein fyribilsfrágreiðing, sigur David Kay, at sama hvat tað endaliga úrslitið verður, so fer tað ikki at samsvara við tær fregnartænastufrágreiðingar, sum komu um viðurskiftini í Irak undan krígnum.



Konfirmatións-
klæðir til
hansara



fáast í

Kallkyn Vágsbotnur Tel. 31 62 06

# Frítíðarundirvísingin á Oyrarbakka

**veturin 2003/2004**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Motiónsfimleikur menn** | Mánadag<br>Fríggjadag | 21.00–22.18<br>21.00–22.18 | Erling Petersen | tlf. 423194 |
| **Postalínsmáling** | Mikudag | 19.00–22.30 | Eydna Johansen | tlf. 422335 |
| **Handarbeiði** | Týsdag | 18.45–22.15 | Katrin Hansen | tlf. 423491 |
| **Klænkiskeið** | Mikudag | 18.30–22.00 | Edna Einarsson | tlf. 421289/217089 |
| **Fimleikur kvinnur** | Týsdag | 19.30–20.48 | Lovisa Ellendersen | tlf. 268401 |
| **Fimleikur gentur** | | | | |
| 4 til 6 ár | Mánadag | 16.00–17.00 | Birna Larsen | tlf. 422265 |
| 7 til 10 ár | Mánadag | 16.00–18.00 | Birna Larsen | tlf. 422265 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tó 500 kr. fyri motiónsfimleik menn, og tað skal verða flutt á konto skúlans nr. 6460-1001908 í Føroya Banka beinanvegin, tá ið undirvísingin er byrjað. Skúlanæmingar gjalda 30 kr.
Fráboðan og nærri upplýsingar hjá faklærara.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
**Tlf. 422084**

# Jørð til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er jørð í Svínoy til sølu:

Uttangarðs: 6 gyllin Fyri Handan Fjøll
Innangarðs: 4.130 $m^2$ við Gamlagarð

**Tlf. 318353 · 518353**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Mentanarstuðul

**frá mentamálanevnd Tórshavnar býráðs**

Tvær ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentanarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara, á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 24. oktober 2003. Merk umsóknina "Mentanarstuðul".

SNARSKIVAN

# Til Sølu !



Harley-Davidson FLH 1200.
Prísur : Gev eitt boð
Kann síggjast og roynast í Tórshavn,
sí eisini www.hd.fo

**Ring 0045 51844758 / 0045 87254758**

# Jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag

verður í Badmintonhøllini 29.–30. november.
Tekning á tlf. 317911 innan 20. oktober.

Fyri at fáa so nógv hugskot sum gjørligt, kunnu limir, sum ikki hava so nógvar lutir sum til ein bás, luttaka har tey verða sett saman við øðrum, og samstundis kunnu tey tosa um, hvussu básurin skal passast.

**Føroya Heimavirkisfelag**

# Toyota Avensis 1.8 SOL



Toyota Avensis 1.8 SOL, árg. 02/00, til sølu.
Bilurin er silvurgráur og hevur koyrt 20.500 km.
Prísuppskot: kr. 165.000.

**Tel. 211950** ella **317565**

# Bilverkstaðurin

**í Statoilstøðini í Leirvík er latin upp aftur**

- Persónbilar, lastbilar & Bussar
- Alt vanligt service arbeiði
- Oljuskift
- Dekkskift

**JKH Verkstaðurin**
520 Leirvík
Tlf. 443363

# STONGT

frá 6. til 31. oktober 2003

**Suðuroyar Sunnari Sjúkrakassi**